


*Hallur Joensen, nýggj størna hevur opinberað seg á føroyska billardhimmalinum. Her lýsir hon yvir billardborðinum hjá Mimi.*

stig og 15,09 eygu í meðal og nr. 5 Havnar Klubbi 2 10 stig og 8,4 eygu í meðal.

Meðaltølini hjá seks av teimum bestu í kappingini vórðu: 1. Kristian Sune Høgnesen 28,9 eygu, nr. 2 Hallur Joensen 20,6 eygu, nr. 3 Sonhard Johannessen 20,4 eygu, nr. 4 Niels Nielsen 19,3 eygu, nr. 5 Jan Müller 18,0 eygu og nr. 6 Steinbjørn í Dali 15,9 eygu.

## FM fyri staklingar

Føroyameistarakappingin fyri staklingar verður í Klaksvíkar Klubba 23. og 24. mars. Tilmeldingin er liðug og síggja bólkarnir, ið skulu spæla, soleiðis út: Bólkur 1: Kristian Sune Høgnesen, Niels Nielsen, Jan Müller og Allan Larsen. Bólkur 2: Hallur Joensen, Sonhard Johannessen, Karsten Hansen og Jákup Egholm. Teir báðir bestu í hvørjum bólki fara víðari til semifinalurnar. Verandi føroyameistari, Bjarni Skaalum, hevur tikið sær eitt billardfrítt ár hesaferð. Tí er hann ikki við. Fyrrverandi føroyameistarin Hendrik Petersen er til arbeiðis á høvunum. Tí er hann heldur ikki við.

Eftir øllum at døma fer kappingin at standa millum teir báðar bestu spælararnar í liðkappingini, Kristian Suna og Hall. Men einki er avgjørt frammanundan. Fleiri av hinum spælarunum í kappingini hava fyrr tikið sjálvt sterkari spælarar á bóli, tá avtornaði.




*Silvurliðið úr Mimi: Steinbjørn í Dali og Jan Müller*



*Bronsuliðið úr Klaksvík: Allan Larsen og Hallur Joensen*



*Steinbjørn í Dal, sum vann silvur, her í spennandi dysti móti Klaksvíkar Billardfelag 2*